

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 11 - 2012

# Flyta grønlendska virksemið í skattaskjól

Fleiri av teimum stóru feløgunum, sum fyrireika seg til at fara undir námsvinnu í Grønlandi, hava stovnað sokallað skuffufeløg í skattaskjólslondum, so tey kunnu stinga vinningin í egnan lumma. Tað skrivar Politiken í dag. Blaðið hevur hugt at bygnaðinum í teimum einstøku feløgunum, og hetta kanningararbeiðið avdúkar millum annað, at námsfelagið London Mining, sum skal hava eitt risastórt jarnnám tætt við Nuuk, hevur broytt sín bygnað fyri stuttum, soleiðis at nú eiga tvey skuffufeløg á bretsku oynni Jersey tað grønlendska dótturfelagið, sum skal standa fyri verkætlanini við Nuuk. Eitt annað felag, sum brúkar somu mannagongd, er Greenland Minerals & Energy, sum hevur funnið uran og onnur virðismikil evni í Vesturgrønlandi. Naja Nathanielsen úr IA, sum er forkvinna í vinnunevndini hjá Landstinginum, sigur við Politiken, at hetta er fyrstu ferð, at hon hoyrir um hetta. Hon leggur tó afturat, at sjálvandi eru grønlendingar vitandi um, at feløgini hava hendan møguleikan. Andstøðuleiðarin, Aleqa Hammond úr Siumut, sigur tað vera ørkymlandi, at London Mining hevur støð í einum skattaskjóli. Hon vísir á, at Danmark og fleiri onnur lond hava stórar trupulleikar við at fáa altjóða feløg at rinda skatt, júst tí tey brúka tey sokallaðu skattaskjólini.